









# Radiolýsingar sum rigga

## Fyrilestur við Carsten Agerbæk

Ein útvarpslýsing frá einum biðimanni í Vordingborg í Danmark, har grannadrongurin legði rødd til, gjørdist ársins radiolýsing í Europa í 2007. Maðurin, sum gjørdi vinnandi lýsingina, heldur, at tað eru ov nógvar gráar lýsingar í útvarpi, og hann hevur sína hugsan um, hví so er. Tað ræður ikki endiliga um at verða ovurkreativur við kendum røddum, men meira um at vera greiður og einfaldur – og radiolýsingar kunnu selja vørur, sigur hann.

CARSTEN AGERBÆK greiðir í fyrilestri frá, hvussu tað ber til at gera fangandi radiolýsingar, um veruliga kunnu selja eina fyritøku ella eina vøru. Carsten Agerbæk hevur royndir sum radiovertur og framleiðari. Hann hevur arbeitt sum skribentur á lýsingarstovum og hevur meira enn 20 ára royndir við ljóðlýsingum. Carsten Agerbæk vann í 2004 og 2007 heiðursløn í Danmark fyri bestu útvarpslýsing, og í 2007 vann hann heiðursløn fyri ársins europeisku útvarpslýsing á NAB Europe.




### Radiolýsingar sum rigga

**Fyrilestur við Carsten Agerbæk**
**Hotel Tórshavn, hósdagin 25. februar**
**kl. 9.00-12.00**

Tiltakið er ókeypis. Tilmelding á birgir@ras2.fo

Tey, sum eru við til tiltakið, verða eisini boðin til hugnatiltak í Miðlahúsinum og Rex fríggjakvøldið 26. februar. Á skránni verður matur, undirhald og tónleikur við Frændum og fleiri. Hugnakvøldið heldur fram á Rex eftir midnátt.

RÁS 2 ...títt radio

RÁS2 · TÓRSGØTA 1 · FO-100 TÓRSHAVN · TEL 35 99 99 · RAS2@RAS2.FO · WWW.RAS2.FO